## Meiri laksur og minni toskur

Nýggj norsk hagtøl vísa, at norðmenn útfluttu laks fyri 867 milliónir norskar krónur í september. Tað var 9 prosent meiri enn í august og heili 17 prosent meiri enn í september í fjør.

Til tann 30. september høvdu norskir alarar útflutt laks fyri góðar sjey milliardir krónur ella einar 300 milliónir meiri enn níggju teir fyrstu mánaðarnar í fjør. Nøgdin higartil í ár er 339.000 tons, sum er 14 prosent meiri enn um somu tíð í 2002, men harafturat er prísurin eisini hækkaður. Í september var meðalprísurin 21 krónur fyri kilo, og tað var hálva triðju krónu oman fyri meðalprísin í august. ES-londini keypa at kalla allan tann norska laksin. Higartil í ár hava ES-londini keypt norskan laks fyri 4,6 milliardir krónur, og tað er seks prosent meiri enn í fjør. Samstundis veksur sølan til Russlands og Pólands skjótt.

Meðan norski laksaútflutningurin sostatt er í vøkstri, er gongdin tann øvugta við toskinum. Higartil í ár er virðið á toskaútflutinginum minkað 3,9 milliardir krónur ella 20 prosent samanborið við í fjør. Samstundis er útflutingurin av upsa minkaður 940 milliónir krónur ella níggju prosent.

## Oljukeldur tómar

Nakrar av oljukeldunum í danska partinum av Norðsjónum geva nú so lítið, at tað er ikki vert at tosa um. Eitt nú góvu leiðirnar Lulita og Dagmark bara eitt tons av olju hvør í farna mánað.

Men Dansk Undergrunds Consortium ætlar kortini ikki at lata keldurnar aftur. Andreas Wúrtz, varastjóri í Mærsk Olie og Gas, sigur við JydskeVestkysten, at pallarnir á Dagmar og Lulita-leiðunum eru ómannaðir og passa seg sjálvar, sum hann tekur til, og hann væntar, at tað ber til at fáa meiri olju burtur úr teimum við at økja trýstið í undirgrundini.

Dansk Undergrunds Consortium fekk annars 297.364 føt um dagin upp úr teimum fjúrtan keldunum í Norðsjónum í september mánað ella 1,23 millión tunnur tilsamans. Tann týdningarmesta leiðin er Dan-leiðin, haðani DUC fekk 413.000 tons í september. Halfdan-leiðin gav 326.000 tons.

## Bjørn drap myndafólk

Amerikanski náttúrumyndamaðurin Timothy Teadwell og unnusta hansara, Annie Huguenard, vórðu í vikuni funnin deyð í friðaða náttúruøkinum Katmai í amerikanska statinum Alaska.

Løgreglan sigur, at ein bjørn hevði dripið tey bæði myndafólkini. Á staðnum fann løgreglan eitt videotól, og tað vísti seg, at tólið hevði verið frá, tá bjørnin leyp á Timothy Teadswell og drap hann. Myndir vóru kortini ongar av sjálvum drápinum, men á ljóðinum hoyrdist, hvat var hent, sigur løgreglan. Á nøkrum øðrum myndum sæst bjørnin væl, men løgreglan sigur, at myndirnar verða ikki almannakunngjørdar.

Timothy Teadswell var ein kendur náttúrumyndamaður, og fyri nøkrum árum síðani var hann við til at gera eina bók um bjarnirnar í Alaska.

## Nógv rúsevni upp í royk

Á hvørjum ári seta myndugleikarnir í Iran eld á rúsevni, sum løgreglan og tollvaldið hava lagt hald á.

Tað eru ikki smávegis nøgdir, sum fara upp í royk, og mikudagin vórðu heili 40 tons av ymsum rúsevnum brend í høvuðsstaðnum Teheran. Løgreglan sigur, at hon hevur lagt hald á nógv rúsevni í ár. Bara í landspartinum Zahedan hevur løgreglan funnið trettan tons av rúsevnum síaðni tann 1. mars. Tað mesta er heroin, morfin og hasj, sum kemur úr grannalandinum Afghanistan, og sum smuglararnir ætla at senda á marknaðin í Evropa.

Men tað eru ikki bara rúsevni, sum iranska løgreglan kemur fram á, tá hon avdúkar smuglararnar. Sagt verður, at tað seinasta hálva árið hevur løgreglan eisini funnið eina rúgvu av vápnum og lóðuri, og hesa tíðina eru 231 fólk tikin og skuldsett fyri smugling.

**UTTAN ÚR HEIMI**

# Margretha eigur at lata Fríðrik sleppa framat



*Nógvir túsund danir fagnaðu tí trúlovaða parinum, tá tey komu út á svalan á Amalienborg mikudagin. Og nógvir danir vilja hava tey at loysa Margrethu, drotning og Heindrik, prins av*

*Mynd: Reuters*

**Nógvir danir halda, at Margretha, drotning, eigur at fara frá um ikki alt ov langa tíð, so Fríðrikur og Mary kunnu taka við**

KONGSHÚSIÐ
*Árni Joensen*
*fartekst@mail.dk*

Tað er tó ilt at siga, um hetta hevði verið úrslitið, um allir danir høvdu verið við í kanningini, sum Catinét Research hevur gjørt. Talan er nevnliga um eina kanning, sum er gjørd ígjøgnum internetið. Mett verður, at 70 prosent av danska fólkinum hava atgongd til internetið, og tað er serliga tað eldra ættarliðið, sum ikki hevur internet.

Men helmingurin av teimum, sum hava atgongd til internetið, siga, at Margretha drotning eigur at fara frá um ikki alt ov langa tíð, so Fríðrikur krúnprinsur og Mary Donaldson sleppa á trúnuna, áðrenn tey verða ov tilkomin.

Kanningin vísir eisini, at danir eru væl nøgdir við ta komandi drotningina. 54 prosent eru á einum máli um, at hon bar seg væl tann fyrsta dagin fyri almenninginum, men heili 83 prosent siga seg vænta, at hon fer at klára seg væl sum drotning.

# Sýrialand ávarar Ísrael

**Halda ísraelsmenn fram við at leypa á mál í Sýrialandi, fara sýrar at svara aftur við hermegi.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*
*fartekst@mail.dk*

Tá ísraelsk flogfør søktu at málum stutt frá sýriska høvuðsstaðnum Damaskus seinasta sunnudag, valdu sýrisku myndugleikarnir at svara aftur við diplomatiskum tiltøkum. Men nú Ariel Sharon, forsætisráðharri, hevur hótt við at halda fram við álopunum, hótta sýrar við at svara aftur við hermegi.

Sýriski sendiharrin í Spania, Mohsen Bilal, segði í gjár, at leypa ísraelsmenn á eina ferð afturat, fer Sýrialand at svara aftur við hermegi.

- Leypa ísraelsmenn áaftur, noyðast sýriska stjórnin og herurin at svara aftur fyri at verja landið, segði sendiharrin.

Eygleiðarar í Miðeystri hava annars sagt, at tað er lítið sannlíkt, at sýrar fara at nýta hermegi ímóti Ísrael, tí hernaðarliga er Ísrael nógv sterkari enn Sýrialand. Men sýrar fara ikki at aftra seg við at nýta hermegi, sigur sendiharrin í Madrid.

- Sjálvandi ikki. Vit fara at verja okkum. Men vit berjast fyri friði, og vit hava skotið upp at taka friðarsamráðingarnar um Miðeystur uppaftur, sigur Moshen Bilal.

Ísrael og Sýrialand vóru í kríggi fyri 30 árum síðani, og tekniskt stendur krígsstøðan framvegis við.



# Símun Hansen vann bátin hjá Kiwanis



*Símun Hansen fær her bátin, sum Kiwanisfelagið burturlutaði við lutaseðlasølu á Ólavsøku. Hetta er áttandi báturin, sum felagið lutar burtur*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

**Sum undanfarin ár seldi Kiwanisfelagið aftur lutaseðlar á Ólavsøku, har vinningurin var ein bátur. Og í ár gjørdist tann hepni vinnarin Símun Hansen úr Svínoy**

KIWANIS
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Símun Hansen úr Svínoy gjørdist vinnarin av bátinum, sum Kiwanisfelagið lutaði burtur á Ólavsøku. Fyrr í vikuni fekk so Símun pappírini upp á bátin handað. Men av tí at brim var í Svínoy, so bar ikki til, at fáa bátin út til Svínoyar beinanvegin. Men Símun hevur ætlanir um at fáa bátin út so skjótt, sum tað viðrar.

Heri Simonsen, formaður í Kiwanisfelagnum, sigur, at hetta er tann áttandi báturin, sum felagið lutar burtur. Hann letur sera væl at undirtøkuni fyri hesum tiltakinum millum fólk.

Kiwanisfelagið savnar pening inn til vælgerandi endamál – fyrst og fremst børnum og minnimentum at frama. Avgerðin er tikin um, hvar peningurin skal fara í ár, men Heri vil ikki avdúka tað, tí móttakarin hevur ikki fingið boðini enn.

### Torført at lata

Heri Simonsen sigur, at tað hevur víst seg at vera sera lætt at savna peningin inn, men tað er hinvegin avbera torført at gera av, hvar peningurin skal fara. Hann greiðir frá, at spurningurin um hvussu tey skulu geva, ikki altíð er so lættur at avgreiða.

– Tað er tørvur á hjálp allastaðni í samfelagnum í dag, men aloftast tá tað er talan um børn, so er torført at finna tørvin, tí slík mál eru sum oftast vard av tagnarskyldu, sigur Heri og leggur afturat, at tað tí er av alstórum týdningi, at tey eru sera nógv úti um seg og kunnu finna fólk, ið veruliga eru í neyð av eini ella aðrari orsøk. Tað veri seg vanlukkuraktar familjur ella líknandi.

Kiwanisfelagið letur eitt nú pening til familjur, sum tey hoyra um, ikki eru so væl til beint fyri jól til dømis. Er trupulleikin sjúka ella deyðsfall, so lata tey pengar. Men um trupulleikin er rúsevnismisnýtsla í familjuni, so lata tey eitt gávukort frá einum matvøruhandli, sum ikki kann vekslast út sum reiður peningur.

Hetta gera tey, sum sagt tí at tørvurin hjá børnunum stendur fremst. Og felagið leggur stóran dent á, at peningurin fer beinleiðis til tey røttu, sum hava tørvin - uttan nakað millumlið.

### Trý høvuðstiltøk

Kiwanisfelagið hevur trý høvuðstiltøk um árið. Fyrst er tað báturin á Ólavsøku. Síðani selja tey jólatrø til jóla og um páskirnar lata tey súkkluhjálmar til øll børnini, sum ganga í fyrsta flokki.

Tey bæði fyrru tiltøkini eru beinleiðis innsavningartiltøk, men tiltakið við súkkluhjálmunum verður stuðlað. Komandi ár verður fimta árið, at súkkluhjálmarnir verða latnir næmingunum í fyrsta flokki, sum plaga at vera millum 700 og 800 í tali um árið.

Jólakalendari í SvF:

# Post-Boði vil hava post

**Sjónvarp Føroya er nú farið undir at fyrireika og upptaka ársins jólakalendara fyri børn og ung. Eitt posthús verður karmur um tær 24 sendingarnar, sum ikki líkjast nøkrum, vit fyrr hava sæð í føroyskum sjónvarpi**

JÓLAKALENDARI
*Solby A. Eliasen*
*solby@sosialurin.fo*

Heldur tíðliga kanska at fara at tosa um jólini, men hjá teimum, sum fyrireika jólakalendaran í Sjónvarpi Føroya er hetta als ikki ov tíðliga. Tey byrja at verða jólalig nógv fyrr enn øll onnur.

Fyrireikingarnar og upptøkurnar av jólakalendaranum í ár eru sum sagt farnar í gongd, og Post-Boði, sum kalendarin eitur, hevur nú brúk fyri hjálp. Tí ætlanin er at vísa upptøkur, sum hyggjarin sjálvur hevur gjørt. Og tað vil siga, at ein og hvør kann senda eina upptøku inn, og so verður hon víst í Sjónvarpi Føroya.

Frá Sjónvarpi Føroya verður sagt, at tað sum kann sendast inn, kann til dømis vera upptøkur at tær, tá tú vart lítil, av kaninini, av hundinum, tá tú spælir ella venur. Enntá verður sagt, at um tú hevur hug at gera ein teknifilm, so ber tað eisini til.

Upptøkan, sum send verður inn, skal verða umleið tveir til tríggjar minuttir til longdar, og so hevur SvF ætlanir um at vísa tríggjar upptøkur, sum eru sendar inn, hvønn dag.

Bandið skal verða Sjónvarpinum í hendi innan 15. november. Sagt verður at tað er líka mikið, hvat slag av bandi tað er. Meira fæst at vita um hetta á heimasíðuni hjá SvF www.svf.fo